## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin fleyr til gul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í strúk av suðri og avfall, møguliga fyrst sum vátakavi, seinni regn. Hitin millum 3 og 7 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av suðri og regn. Seinnapartin sami vindur av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og fyrrapartin regn, annars támut veður. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 6 og 10 stig.

# Stongdu Løgtingið og fóru heim at passa børn

**Seinnapartin í gjár endaði tingfundurin fyrr enn vanligt, tí at politikarar skuldu heim at passa sínar húsligu skyldur**

**POLITIKARA-LÍV**
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í gjár endaði tingfundurin nakað fyrr enn vanligt.

Orsøkin var, at nakrir av politikarunum eisini høvdu sínar húsligu skyldur at passa og so mátti Løgtingið dvína.

Summir av politikarunum høvdu børn at heinta og taka sær av, og tí vórðu tvey mál tikin av skránni, so at løgtingsfundurin kundi enda stutt eftir klokkan 16 í gjár.

Tá hevði tingfundurin vart í góðar fimm tímar, tí hann varð ikki settur fyrrenn klokkan 11 í gjár.

Men tá ið klokkan var farin av fýra seinnapartin tók Kári á Rógvi orðið og bað um at fáa tey bæði málini, sum eftir vórðu at viðgera, av skránni.

Tað vóru tvey mál, sum hann átti sjálvur, ið hann bað um at fáa av skránni.

Annað málið var um ein skrivligur fyrispurningur, sum Annika Olsen, landsstýriskvinna, skuldi svara honum um kommunala stjórnarskipan og valreglur. Hitt málið var ein skrivligur fyrispurningur, sum Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, skuldi svara um førda fiskivinnupolitikkin.

Men tá ið klokkan gekk til fimm seinnapartin helt Kári á Rógvi, at nú nærkaðist tíðin, har Tingvarpið í sjónvarpinum mátti dvína fyri vanligu sjónvarpsskránni.

Samstundis vóru tað politikarar, sum høvdu børn at heinta og taka sær av, og summir politikarar vóru longu farnir at heim til sínar húsligu skyldur.

Samstundis hevur verið fýlst á, at Løgtingið hevur ov lítið at gera og at tað er ov langt ímillum tingfundirnar.



*Ì gjár tømdust tingsalurin fyrr enn vanligt, so at politikarar sluppu heim at passa børn og hús og heim*

Tí bað hann um, at teir báðir fyrispurningarnir vórðu tiknir av skrá, so at tingfundurin kundi enda og politikararnir sluppu til hús.

Og tað eftirlíkaði formaðurin. Hann segði, at biðjur ein spyrjari um at fáa ein spurning kann tiknan av skránni, plaga formaðurin altíð at ganga áheitanini á møti og tað gjørdi hann eisini hesuferð.

Sostatt sluppu politikarar heim nakað væl fyrr seinnapartin í gjár til børn, blæur og uppvask, enn útlitini annars vóru fyri.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -3 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | -- |
| Ammassalik | -6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -6 |
| Seyðisfjørður | -1 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 0 |
| Aberdeen | 1 |
| London | 4 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | -1 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 3 |
| Helsinki | -6 |
| Moskva | -2 |
| Berlin | 2 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | 5 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 14 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 13 |
| New Dehli | 16 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 11 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1012 hPa. í útsynning úr Føroyum fer í landsynning og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 992 hPa. eystan fyri Hvarvið fer móti Íslandi.



**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer móti Íslandi og hitabrúgvin haðani verður við Føroyar fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/02 kl. $06^{00}$ – 12/02 $06^{00}$. Hitin í gjár: -0,4°
Minsti hiti máldur í februar: -11,0° - Mesti hiti máldur í februar: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 10/02 kl. $06^{00}$ – 11/02 $06^{00}$.
Avfallið higartil í februar: 55 mm

Alt um harmonikur



www.simme.eu




## VESTFALLSKYRRINDI

7. februar – Mánin næstur jørðini
9. februar – Fullmáni
16. februar – Seinna kvarter
19. februar – Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. feb. | 8:37 | 20:59 | 7:37 | 19:59 | 7:52 | 20:14 | 10:37 | 22:59 | 11:37 | 23:59 | 6:52 | 19:14 | 5:52 | 18:14 | 8:52 | 21:14 | 9:52 | 22:14 | 8:22 | 20:44 | 9:37 | 21:59 |
| 13. feb. | 9:22 | 21:44 | 8:22 | 20:44 | 8:37 | 20:59 | 11:22 | 23:44 | - | 12:22 | 7:37 | 19:59 | 6:37 | 18:59 | 9:37 | 21:59 | 10:37 | 22:59 | 9:07 | 21:29 | 10:22 | 22:44 |
| 14. feb. | 10:06 | 22:28 | 9:06 | 21:28 | 9:21 | 21:43 | - | 12:06 | 0:44 | 13:06 | 8:21 | 20:43 | 7:21 | 19:43 | 10:21 | 22:43 | 11:21 | 23:43 | 9:51 | 22:13 | 11:06 | 23:28 |
| 15. feb. | 10:51 | 23:28 | 9:51 | 22:28 | 10:06 | 22:43 | 0:28 | 12:51 | 1:28 | 13:51 | 9:06 | 21:43 | 8:06 | 20:43 | 11:06 | 23:43 | - | 12:06 | 10:36 | 23:13 | 11:51 | - |
| 16. feb. | - | 12:05 | 11:05 | 23:43 | 11:20 | 23:58 | 1:28 | 14:05 | 2:28 | 15:05 | 10:20 | 22:58 | 9:20 | 21:58 | - | 12:20 | 0:43 | 13:20 | 11:50 | - | 0:28 | 13:05 |